GJALDSTOVAN

# Rammusáttmálin

Viðvíkjandi veiting av dátusamskifti til landsins stovnar

millum

Gjaldstovan
Kvíggjartún 1
160 Argir
Føroyar

**og**

FT Samskifti
Klingran 3
188 Hoyvík
Føroyar
eftir hetta "Veitarin"

GJALDSTOVAN

# INNIHALDSYVIRLIT


| | | |
|---|---|---|
| 1. | Grundarlag | 3 |
| 2. | Orðagreining | 3 |
| 3. | Vavi | 3 |
| 4. | Heimild | 4 |
| 5. | Innkeyp | 4 |
| 6. | Dekningur kring landið | 5 |
| 6.1 | Skiftistíð | 5 |
| 6.2 | Ikki nøktandi samband | 5 |
| 7. | Treytir viðv. marknaðarføring og sølu | 6 |
| 8. | Hagtøl og frágreiðingar | 6 |
| 9. | Samstarv | 6 |
| 10. | Broytingar í prísum fyri vørur og tænastur | 7 |
| 11. | Broytingar í prísskjalinum | 7 |
| 12. | Broytingar í sáttmálanum | 7 |
| 13. | Uppsøgn og mishald | 7 |
| 13.1 | Uppsøgn | 8 |
| 13.2 | Mishald | 8 |
| 14. | Force Majeure | 8 |
| 15. | Avhenda til triðja part | 8 |
| 16. | Trúnaður | 8 |
| 17. | Endurgjald | 9 |
| 18. | Træta | 9 |
| 19. | Longd av sáttmála og lokadagur | 9 |
| 20. | Undirskrift av sáttmála | 9 |

## 1. Grundarlag

Til henda rammusáttmála eru hesi fylgiskjøl:

- Fylgiskjal A: Kravfesting
- Fylgiskjal B: Veitarans tilboð
- Fylgiskjal C: Prísskjal
- Fylgiskjal D: Yvirlit yvir stovnar innan- og uttanfyri Landsnet

## 2. Orðagreining

Við "arbeiðsdag" verður sipað til gerandisdagar frá 08:00 - 16:00.

Við "*keypara*" verður sipað til stovnar innanfyri Landsnet og aðrar stovnar, ið sjálvboðið kunnu brúka sáttmálan til keyp av vørum og tænastum.

Við "*sáttmála*" verður sipað til henda rammusáttmála við øllum tilhoyrandi fylgiskjølum og eftirfylgjandi viðsetingum til henda sáttmála.

Við "*partar*" verður sipað til keyparan og veitaran – í felag partarnir.

Við "*veiting*" verður sipað til tær vørur og tænastur, sum eru lýstar í fylgiskjølunum A og B.

## 3. Vavi

Sáttmálin fevnir um veiting av dátusamskifti til landsins stovnar, sum lýst í fylgiskjølunum A og B. Veiting av dátusamskifti er ein høvuðstáttur fyri at tryggja virksemi hjá landsins stovnum.

Allir stovnar, ið eru bundnir av "Rundskriv nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum" hava rættin til at keypa inn eftir hesum sáttmála.

Gjaldstovan kann sjálvboðið og uttan kostnað loyva øðrum stovnum, ið ikki eru bundnir av "Rundskriv nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum" at brúka sáttmálan sjálvboðið. Hetta kann til dømis vera kommunur, skúlar v.m.

Keyparin er ikki bundin til at keypa inn eina ávísa mongd í samband við veiting av dátusamskifti til landsins stovnar í tí tíðarskeiði, ið sáttmálin er galdandi.

Sáttmálin verður undirskrivaður av Gjaldstovuni.

## 4. Heimild



Gjaldstovan bindir stovnar innanfyri Landsnet, til bert at keypa vørur og tænastur, fevndar av hesum sáttmála, frá veitara í tí tíðarskeiði sáttmálin er galdandi. Stovnar uttanfyri Landsnet kunnu sjálvboðið brúka sáttmálan.

Stovnar innanfyri Landsnet hava 376 hald, sum eru fevnd av sáttmálanum. Stovnar uttanfyri Landsnet hava 134 hald, ið kunnu brúka sáttmálan sjálvboðið. Sáttmálin kann sostatt enda við at fevna um 510 hald.

Hald hjá stovnum uttanfyri Landsnet verða umsitin av stovnunum sjálvum. Hald hjá stovnum innanfyri Landsnet verða framhaldandi umsitin av KT Landsins. Yvirlit yvir stovnar innan- og uttanfyri Landsnet sæst í *Fylgiskjal D – Yvirlit yvir stovnar innan- og uttanfyri Landsnet*.

Um veitarin er vitandi um keyp, fevnt av hesum sáttmála, t.e. stovnar innanfyri Landsnet, ið fer fram uttan um sáttmálan, verður veitarin biðin um at boða Gjaldstovuni frá sum skjótast.

## 5. Innkeyp

Keyparin kann keypa inn vørur og tænastur við at senda eina bílegging til veitaran. Bílegging skal sendast til veitarin á:

Teldupostadressa: ala@ft.fo

Keyparin skal móttaka váttan fyri allar bíleggingar. Veitarin kann loyva keypara at senda bíleggingar umvegis elektroniska skipan, um veitarin hevur eina slíka skipan.

Ein fylgiseðil skal heftast við hvørjum ordra, ið inniheldur:

- Navn á veitara
- Navn og nummar á sáttmála
- Navn og nummar á stovni
- Adressa hjá stovni
- Navn og nummar á vøru
- Nummar á faktura
- Linjunummar á faktura
- Tal av vørum

- Prísur við og uttan MVG
- Dagfesting fyri bílegging

Allar rokningar til stovnar skulu vera í formatinum OIO-UBL við tilvísing til nummar á sáttmála og stovni.

Fakturi fellur til gjaldingar 30 dagar eftir, at keyparin hevur fingið váttan frá veitara.



## 6. Dekningur kring landið

### 6.1 Skiftistíð og skiftisútreiðslur

Um skift verður til nýggjan veitara, skal veitarin vísa á eina tíðarætlan fyri skift av haldum, og hvørja avleiðing skiftið hevur fyri keyparan í skiftistíðini. Henda tíðarætlan skal leggjast fram í seinasta lagi tann dagin, sum sáttmálin verður undirskrivaður. Tíðarætlanin fyri skift av haldum skal ikki vera longur enn 6 mðr. roknað frá degnum, tá ið sáttmálin verður undirskrivaður.

Prísurin skal íroknast tillagan av verandi útgerð og nýggjari útgerð við uppsetan. Veitarin skal sostatt bera allan kostnað í samband við tillagan av verandi útgerð og uppsetan av nýggjari útgerð, um skift verður til nýggjan veitara.

### 6.1 Ikki nøktandi samband

Keyparin hevur stovnar, ið ikki hava eitt nøktandi SamNet samband, og teir eru m.a.:

| Stovnur | Adressa | Adressuferð |
|---|---|---|
| Tjóðsavnið | Kúrdalsvegur 15, Hoyvík | 50M/20M |
| Landsverk – Vegastøðin á Sandi | Heimasandsvegur 145 | 16M/2M |
| Strandfaraskip Landsins – Øravík | Havnargøta 7, Øravík | 20M/2M |
| Akstovan – Øravík | Líðin 81, Øravík | 20M/2M |

Veitarin skal lýsa hvussu sambandið á omanfyrinevndu stovnum verður tryggjað og vísa á eina tíðarætlan.

Veitarin skal binda seg til at tryggja, at sambandið á omanfyrinevndu stovnum verður nøktandi. Hetta skal tryggjast í seinasta lagi 6 mánaðir eftir, at sáttmálin er undirskrivaður.

Verður støðan tann, at veitarin ikki klárar at tryggja sambandið hjá omanfyrinevndu stovnum innan 6 mánaðir krevur keyparin fylgjandi:

1. Trygga loysn, ið er bygd á 4G/5G, og sum gevur samband í millum kunda staðseting og hýsingina.
2. Keyparin krevur, at verandi firewall á kundastaðseting verður brúktur at brongla sambandið til firewall í hýsingini. Hetta fevnir um, at uppsetan má tillagast á firewall á kundastaðseting og á firewall í hýsingini.
3. Veitari ber allan kostnað av broyting og verkseting.

## 7. Treytir viðv. marknaðarføring og sølu

Veitarin kann ikki marknaðarføra og selja aðrar vørur enn vørurnar fevndar av hesum sáttmála til stovnar, ið eru bundnir av sáttmálanum.

Um veitarin velur at selja vørur, ið eru fevndar av hesum sáttmála til ein lægri prís enn sáttmálin ásetur, til aðrar kundar, skal keyparin hava rættin til sama prís. Veitarin skal upplýsa keyparan um hetta, og skal fáa hetta skrásett saman við aðrari skráseting.

## 8. Hagtøl og frágreiðingar

Veitarin skal í seinasta lagi 30. januar á hvørjum ári lata inn eina frágreiðing um gongd av søluni.

Um biðið verður um hagtøl í úrtíð, so skal veitarin lata inn hagtølini innan 5 yrkadagar uttan kostnað.

Hagtølini skulu skipast á sama hátt, sum á fylgiseðlinum í samband við keyp. Hagtølini skulu latast inn sum Excel fíla.

## 9. Samstarv

Veitarin skal áseta samskiftispersón, ið hevur ábyrgd av hesum sáttmálanum.

Veitarin og ábyrgdarin skulu tryggja, at øll starvsfólk kenna til sáttmálan.

Ábyrgdarin skal hava fulltrú til at taka avgerðir vegna veitaran.

Veitarin skal senda eina skrivliga frágreiðing til Gjaldstovuna innan 5 yrkadagar, um veitarin fær kærur frá stovnum, ið eru bundnir av hesum sáttmála.

Partarnir eru samdir um at samstarva á skikkaðan hátt og yvirhalda ásetingarnar í hesum sáttmálanum. Broyttar fyritreytir, sum hava við sær, at annar parturin ikki kann halda sín part av sáttmálanum, skulu boðast hinum partinum frá sum skjótast.



## 10. Broytingar í prísum fyri vørur og tænastur

Ein príslækkan skal koma keypara til góðar í seinasta lagi ein mánað eftir eina príslækkan hjá NET. Veitarin skal sostatt fylgja príslækkingini hjá NET.

## 11. Broytingar í vørulistanum

Hald kunnu strikast, um tey ganga út (end of life), ella um veitarin ikki hevur møguleika fyri at selja ávís hald longur (end of sale).

Veitarin bindur seg til at bjóða eitt nýtt hald (substitutión), um hald verður strikað úr vørulistanum, sbrt. *Fylgiskjal C – Prísskjal.* Nýggja haldið skal hava somu eginleikar sum strikaða haldið í mun til dygd og prís.

Gjaldstovan skal hava møguleikan fyri at leggja hald afturat vørulistanum, um hetta verður mett neyðugt fyri at tryggja virksemið hjá stovnunum.

Allar broytingar skulu góðkennast av Gjaldstovuni, áðrenn tær verða settar í verk.

## 12. Broytingar í sáttmálanum

Allar broytingar til sáttmálan skulu boðast frá innan eina hóskandi freist. Broytingar verða framdar við einari viðseting til sáttmálan.

Broytingar viðvíkjandi samskiftisupplýsingum hjá veitara (adressur, teldupost, samskiftispersónar) og annars týðiligar villur í hesum sáttmála, fylgiskjølum v.m., sum til dømis skeivar tilvísingar, kann Gjaldstovan broyta uttan góðkenning frá veitara.

## 13. Uppsøgn og mishald

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO

### 13.1 Uppsøgn

Gjaldstovan kann siga henda sáttmála upp við at senda skrivliga fráboðan við eini freist uppá 3 mánaðir seinast í einum mánaði.

Veitarin kann siga henda sáttmála upp við at senda skrivliga fráboðan við eini freist uppá 12 mánaðir seinast í einum mánaði.

### 13.2 Mishald

Um komandi veitarin ikki er mentur at liva upp til minstukrøv í Fylgiskjal A og krøvini í sáttmálanum í ásettu gildistíð, verður hetta mett sum mishald, ið heimilar keyparanum at siga upp sáttmálan.

## 14. Force Majeure

Partarnir kunnu ikki ábyrgdast fyri mishald orsakað av force majeure.

Force majeure verður lýst sum ein hending, sum partarnir ikki hava tamarhald á, og tískil ikki hava møguleika fyri at fylgja treytunum í sáttmálanum vegna kríggj, náttúruvanlukkum, verkfalli v.m.

Partarnir hava skyldu til at manna tilbúgving um neyðugt.

Partarnir bera sjálvir útreiðslur orsakað av force majeure.

## 15. Avhenda til triðja part

Partarnir kunnu ikki avhenda nakrar av sínum skyldum sambært sáttmálanum til triðja part uttan skrivliga góðkenning frá hinum partinum.

Gjaldstovan treytar sær rættin til at nokta avhending til triðja part. Hetta sjálvt um triði partur kann liva upp til treytirnar í sáttmálanum og útboðstilfarinum.

## 16. Trúnaður

Gjaldstovan er fevnd av "Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina".

GJALDSTOVAN | KVÍGGJARTÚN 1 | ARGIR | POSTBOKS 2009 | FO-110 TÓRSHAVN | FØROYAR
TEL +298 35 24 00 | FAX +298 35 24 01 | GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO | WWW.GJALDSTOVAN.FO

Partarnir hava tagnarskyldu um viðurskifti, sum partarnir fáa innlit í hjá hvørjum øðrum umvegis samstarvið eftir hesum sáttmála.

Tagnarskyldan heldur fram eftir, at sáttmálin er farin úr gildi.



## 17. Endurgjald

Partarnir hava endurgjaldsábyrgd sambært føroyskari lóggávu.

Um Gjaldstovan sigur sáttmálan upp vegna mishald, so skal veitarin gjalda endurgjald, sum svarar til útreiðslurnar, sum landið og stovnar hava av hesum.

Gjaldstovan átekur sær onga ábyrgd fyri stovnar, sum sjálvbodnir brúka sáttmálan.

Gjaldstovan hevur ikki ábyrgd yvir fyri triðja parti viðvíkjandi sáttmálum, ið Gjaldstovan ikki varar av. Veitarin hevur sjálvur ábyrgd mótvegis sínum undirveitarum.

Um komandi veitarin til henda sáttmálan er ein handilsfelagsskapur, skal hesin hava samábyrgd.

## 18. Træta

Træta skal, um møguligt, loysast partarnar ímillum við samráðingum.

Trætan skal loysast við dómstólarnar, um partarnir ikki kunnu loysa trætuna við samráðingum.

## 19. Longd av sáttmála og lokadagur

Sáttmálin kemur í gildi sama dag, sáttmálin er undirskrivaður. Sáttmálin fer úr gildi uttan fráboðan 3 ár eftir dagin, sáttmálin varð undirskrivaður.

## 20. Undirskrift av sáttmála

Sáttmálin er framdur í tveimum eintøkum, sum skulu skrivast undir av báðum pørtum.

Við at skriva undir sáttmálan tryggja partarnir, at tann persónurin, sum skrivar undir sáttmálan, hevur fulltrú til at binda partin, hvørs vegna sáttmálin verður undirskrivaður.

Fyri og vegna keyparan:
Dagfesting: 25-10-2022

Undirskrift

Fyri og vegna veitaran:
Dagfesting: 27-10-22

Undirskrift

1